# Knýta og viðlíkahalda sambond



**Kunningarfundur fyri læknalesandi og basislæknar/yngri yvirlæknar verður 27. juli á landssjúkrahúsinum**

TÍÐINDASKRIV

Sum liður í menningini av føroyska heilsuverkinum ynskja Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús, Suðuroyar sjúkrhús, Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, Kommunulæknaskipanin og Ílegusavnið at knýta og viðlíkahalda sambond við læknalesandi og basislæknar/yngri yvirlæknar.

Tí vil Heilsuverkið tann 27. juli bjóða læknalesandi, óansæð hvussu langt tey eru komin við lestrinum ella hvar tey lesa, umframt basislæknum/yngri yvirlæknum, óansæð hvar tey starvast, at koma til kunningarfund á Landssjúkrahúsinum, har ymisk viðkomandi evni verða viðgjørd.

Á fundinum verða fylgjandi evnir:

**1.** – Útbúgving av kommunulæknum (almenn medisin) í Føroyum. Umframt kunning um endurskoðanina av kommunulæknaskipanini – Jóna Hansen, lækni (undir útbúgving til serlækna í almenn medisin) og Margit Stórá, samskipari.

**2.** – Menningartilgongdin innan HR í heilsuverkinum og samskipan av uttanlandsviðgerðini, umframt heimtøkuverkætlanir – Bente Wennerberg, menningarstjóri.

**3.** – Læknafakliga avbjóðingar í teirri góðu sjúklingagongdini – Tummas í Garði, varastjóri.

**4.** – At fara undir heilsugransking – Pál Weihe, yvirlækni og Sigurð Ó. Vang, stjóri.

Fundurin verður hildin í Gestaboðsstovuni á Landssjúkrahúsinum í Eirargarði (omanfyri J. C. Svabosgøtu – undir Matarhøllini) og er frá klokkan 14 til 16. Best er um fólk boða frá luttøku (men ikki avgerandi treyt) á biobank@ls.fo ella við sms-boðum á fartelefon 59 10 25.






Starvslýsing

Sosialurin



## Sølufólk til Sosialin

Ert tú fyrikomandi, dugir væl at selja, ert álítandi, røkin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir einum starvsfólki, sum kann verða við til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku fjølmiðlunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa, og ikki minst, arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum og temabløðum. Umframt hetta, verður tú ein týðandi partur av søluarbeiðinum hjá Sosialinum, Rás2 og Portalinum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til Sosialin. Ynskir tú at fáa meira at vita um størvini, ert tú vælkomin at ringja á tel. 341823 / 222081. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er týsdagin 28. juli og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
Att.: Gudny Langgaard
Postsmoga 76
FO – 110 Tórshavn

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir í dag um tríggjar miðlapallar. Blaðútgávu, tíðindaflutning á netinum og útvarp. Tilsamans starvast um 45 fólk í samtakinum.